# Løgmaður eyðmýktur í heimbýnum



*Kvettroyndin móti løgmanni í heimbygdini miseydnaðist á hesum sinni, og vórðu tey bæði Jóannes Eidesgaard og Nita Næs vald at umboða Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag*

**Spenningur var til síðstu løtu, tá ið Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag hevði síðsta uppstillingarfund sunnudagin, har ein kvettroynd móti Jóannes Eidesgaard miseydnaðist**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*áki@sosialurin.fo*

Lagt er upp til rokfund á Tvøroyri seinnapartin sunnudagin, tá Javnaðarfelagið hevur uppstillingarfund har.

Jólafriðurin í Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag var í vanda, eftir uppstillingarfundin í felagnum týskvøldið, har eini 40 limir møttu. Felagið skuldi finna tvey valevni til løgtingsvalið, eina kvinnu og ein mann. Skotið varð upp, at valevnini skuldu vera Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Nita Næs úr Hvalba. Nú hildu øll væl standa til. Men júst sum fundarfólkið ætlaði at avgreiða málið, skeyt Sverri Midjord eisini Kristin Michelsen, borgarstjóra, upp. Hetta var ikki væl móttikið og nú kom eldur í koluna.

### Misálit í heimbygdini

Jóannes Eidesgaard, løgmaður av Tvøroyri kendi seg eyðmýktan og talaði við stórum stavum. Hann segði hetta vera eitt misálit á seg at skjóta Kristin Michelsen upp, tá fundurin hevði gjørt av, at tað skuldu bara vera ein kvinna og ein maður. Tí var stríðsval einasti útvegur. Sverri Midjord gjørdist frá sær sjálvum, og ætlaði at rýma av fundinum, og taka sínar 300 atkvøður við sær, sum hann tók til. Men hann var rikin inn aftur. Eftir miklan orðadrátt var endin, at Kristin Michelsen tók seg av aftur listanum, tí hann ynskti ikki stríðsval millum seg og Jóannes Eidesgaard. Men hetta vildi Jóannes Eidesgaard ikki góðtaka, og fyri at ongin skuldi vera illtonktur fyri óreiðiligheit, helt hann uppá at hava enn ein uppstillingarfund.

Hesin fundurin var seinnapartin sunnudag, og tá var spennandi at vita, um vongurin hjá Kristin Michelsen hevði mobiliserað somikið, at tey fingu atkvøtt løgmann av listanum. Okkara keldur søgdu, at um Kristin Michelsen varð valdur fram um Jóannes, fór felagið í spønir.

### Friður aftur

Men hóast lagt var upp til rok á uppstillingarfundinum hjá Javnaðarflokkinum í norðara parti av Suðuroynni sunnudagin, gekk fundurin stillisliga fyri seg. Úti ímóti 50 limir í felagnum møttu upp til fundin, har tey bæði valevnini skuldu finnast.

Men hvørki Sverri Midjord ella Kristin Michelsen møttu upp á uppstillingarfundinum, og vóru tey bæði Jóannes Eidesgaard og Nita Næs vald. So kvettroyndin móti løgmanni miseydnaðist á hesum sinni.

# »Den Gale Færing« handtikin eftir kníválop




**Ein maður er framvegis í lívsvanda, eftir at ein 32 ára gamal føroyingur leygarkvøldið stakk tveir mans niður á Vesturbrúgv í Keypmannahavn. Í besta føri verður offrið lamin frá hálsinum og niður**

LØGREGLUMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ein føroyskur maður varð handtikin av donsku løgregluni sunnumorgunin, tí hann hevði stungið tveir mans niður við knívi leygarkvøldið. Steen Jensen, kanningarleiðari hjá politinum í Keypmannahavn, sigur við Sosialin, at gerningsmaðurin, sum hevur føroyskan pápa, gjørdist frá sær sjálvum, tá maðurin, sum nú er í lívsvanda, stjól 18.000 krónur frá honum.

*Steen Jensen, kanningarleiðari hjá politinum í Keypmannahavn sigur við Sosialin, at í besta føri verður offrið lamin frá hálsinum og niður*

### Er enn í lívsvanda

Knívtilburðirnir fóru fram á alfaravegi við tveimum tímum ímillum. Fyrsta hendingin á Istedgade kl.16:40, har ein 32 ára gamal maður varð stungin í ryggin. Einar tveir tímar seinni varð ein 41 ára gamal stungin í hálsin. Hetta var á horninum millum Skt. Jørgens Allé og Vesterbrogade. Hesin seinni er sera illa meiddur, allar sinur í hálsinum eru kvettar av, og hann er í lívsvanda. Sambært Steen Jensen verður maðurin í besta føri lamin frá hálsinum og niður. Tey bæði offrini høvdu onki samband við hvørt annað.

### Kendur í narkoumhvørvinum

Føroyingurin, sum er kendur í narkoumhvørvinum, og gongur undir navninum "Den Gale Færing" varð eftirlýstur í donskum miðlum longu í leygarkvøldið. Tá hevði politiið funnið bæði felliknív, Dankort og sjúkratryggingarkort hansara nærhendis seinna gerningsstaðnum. Maðurin varð handtikin á sjómansheiminum í Nyhavn tíðliga sunnumorgunum, har hann sat og sproytaði seg.

### Ákærdur fyri drápsroyd

Steen Jensen sigur eisini, at føroyingurin júst var komin niður aftur við flogfarinum, eftir at hava verið í Føroyum og vitjað pápa sín. Mamman er donsk. 32 ára gamli føroyingurin varð grundlógaravhoyrdur seinnapartin sunnudagin, og er nú varðhaldsfongslaður í 25 dagar, meðan politiið kannar málið nærri. Ákæran ljóðar upp á drápsroynd, men verður broytt, um offrið doyr. Føroyski maðurin, sum noktar seg sekan, var annars á veg til Norðurjútlands, har hann skuldi vitja familjuna. Bæði føroyingin og offrini eru úr narkoumhvørvinum, og kendir av politinum í Keypmannahavn.